## Mótmæli í Iran

Í Iran hevur andstøðan skipað fyri stórum mótmælisgongum í høvuðsstaðnum Terheran í dag í sambandi við, at myndugleikarnir hátíðarhalda, at 31 ár eru liðin síðani ta islamsku kollveltingina. Almenna sjónvarpið vísti bara myndir av fólki, sum tóku lut í hátíðarhaldinum hjá stjórnini, men tíðindastovurnar skriva, at stutt haðani vóru samanbrestir millum mótmælisfólk og løgregluna. Sagt varð, at løgreglan brúkti táragass, og at løgreglan hevði gjørt seg inn á andstøðuleiðararnar Mehdi Karoubi og Mohammad Khatami.



## 9 prosent arbeiðsleys

Um mánaðarskifti stóðu 14.705 fólk skrásett í íslendsku arbeiðsloysisskipanini sum arbeiðsleys. Tað svarar til 9 prosent av teirri arbeiðstøku fjøldini, og tey arbeiðsleysu vóru 929 fleiri enn í desember, skrivar Morgunblaðið. Hagtølini vísa, at arbeiðsloysið er heldur størri í Reykjavík og har um vegir enn á bygd. Tølini vísa eisini, at 9,9 prosent av teimum arbeiðstøku monnunum og 7,9 prosent av teimum arbeiðstøku kvinnunum eru arbeiðsleys. Íslendski vinnumálastovnurin væntar, at arbeiðsloysistølini í februar verða heldur størri enn tey í januar.



*Løgtingið vil ikki á nakran hátt leggja seg út í kirkjuligu viðurskiftini*

# Tingið ræðist fyri at blanda seg

**Orðaskiftið í løgtinginum mikudagin vísti, at tingfólk eru sera varin at siga sína hugsan um viðurskiftini í Fólkakirkjuni**

FÓLKAKIRKJAN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Breið semja er í løgtinginum um, at politikararnir skulu halda fingrarnar langt burtur frá tí, sum fer fram í Fólkakirkjuni. Løgtingið skal ikki leggja seg út í at broyta kirkjuligar reglur ei heldur ósemjur.

Tað vísti orðaskifti í løgtinginum mikudagin, tá ið Helena Dam á Neystabø svaraði fyrispurninginum frá Torbjørn Jacobsen um kirkjuna. Spurningur var, um landsstýriskvinnan ætlar at broyta reglurnar, nú nógv orðaskifti hevur verið um, at summir prestar ikki vilja víga fráskyld fólk. Tað hava teir rætt til at nokta.

Fleiri tingfólk nevndu, at tingið skuldi vera varið, tí hetta var jú semja um, tá ið Fólkakirkjan varð yvirtikin. Sum Helena Dam á Neystabø segði:

- Mál av tílíkum slag skuldu avgreiðast í demokratisku skipan fólkakirkjunnar í samstarvi við politiska myndugleikan.

### Ótíðarhóskandi regla

Hon helt tó, at reglan við, at prestar kunnu sýta at víga fráskyld fólk, er ótíðarhóskandi, og tað var hennara vón, at orðaskiftið, sum nú hevur tikið seg upp, fer at ávirka prestarnar og ikki minst kirkjuliðini soleiðis, at reglan fer at verða broytt á sama hátt sum reglan, ið noktaði kvinnum at vera prestar, á sinni varð broytt.

Helena Dam á Neystabø tosaði eisini um tolsemi, og at tað bara skaðar at smalka dyrnar og hækka gáttina. Hinvegin má tolsemi ganga báðar vegir. Somu sjónarmiðini, sum noktandi prestarnir hava, finnast eisini millum kirkjufólk.

- Tí er málið ikki so einfalt sum bara at taka av eina, í mínum hugaheimi, ótíðarhóskandi kunngerð, segði hon.

### Kirkjan má taka stigið

Men skal ein broyting gerast, má broytingin koma frá kirkjuni sjálvari, tí um politiska skipanin skúgvar kirkjuliga myndugleikan til viks, loysir einki vandamál, segði Helena Dam á Neystabø.

John Johannesen helt, at kirkjan eigur at vera víð. Har skal vera rúm fyri øllum, sum onga aðrastaðni hava at venda sær. Hann helt tað vera nokkso løgið, at prestar sum tænastumenn kunnu sleppa sær undan eini tænastu. Tað kunnu onnur tænastufólk ikki.

Fleiri, sum tóku orðini, mintu á, hvussu umráðandi tað var at vanda sær um orðini í einum slíkum máli, og Helgi Abrahamsen helt, at hetta var nakað, sum kirkjuligi myndugleikin burturav átti at taka sær av.

Poul Michelsen helt ikki, at tað heilt ber til hjá politiska myndugleikanum at halda seg uttanfyri orðaskiftið, tí vit koma ikki uttanum, at kirkjan fær pengar frá tí almenna. Fær kirkjan ikki tað, verður eingin fólkakirkja.

### Hví so varin?

Spyrjarin Torbjørn Jacobsen var ikki so bangin fyri orðaskiftinum.

- Í kirkjuna skal ein og hvør kunna koma, og tað skal ikki vera upp til starvsfólk í kirkjuni, hvør skal kenna seg væl. Eg skilji ikki, hví politiska skipanin bara skal stinga høvdið í sandin. Hví skal kirkjumálaráðharrin ikki hava nakra meining um kirkjumál, segði Torbjørn Jacobsen.

Helena Dam á Neystabø helt seg ikki hava dult sína meining, tí hon bar fram, at reglan, sum loyvir prestum at sýtra at gifta fráskyld, er ótíðarhóskandi.

Torbjørn Jacobsen spurdi eisini, um nøkur ætlan er at fara undir lestur í telologi á Fróðskaparsetrinum.

Svarið hjá Helenu Dam á Neystabø var, at Fróðskaparsetrið fer ikki undir fullfíggjaða útbúgving av prestum, men hon kundi hugsað sær, at tað bar til at læra føroyskar kirkjusiðir, og at arbeitt verður við eini skipan við fjarlestri í samstarvi við ein hægri lærustovn uttanlands.

## Tikin við ølkassanum

**Ein ungur maður varð mikudagin handtikin, tá ið hann kom í land av Smyrli á Krambatanga. Í bilinum hevði hann ein ølkassa, og maðurin varð skuldsettur fyri at hava tjóvagóðs í hondum**

TJÓVARÍ
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Sunnunáttina varð innbrot gjørt í kaféini í Hópinum á havnarlagnum í Toftum. Tríggir kassar av gulløli hvurvu.

Mikudagin fekk politiið eina fráboðan um, at ein maður var á veg til Suðuroyar, og hetta var ein ungur maður, sum politiið hevði illgruna um hevði okkurt við innbrotið at gera.

Tá ið Smyril legði at á Krambatanga, stóð politiið fyri bili hansara. Í bilinum var ein ásettur ølkassi, og politiið heldur fyri vist, at ølkassin var ein av teimum stolnu kassunum av Toftum.

Politiið heldur ikki, at maðurin var við til at bróta inn, men heldur at hann hevur tikið ímóti einum av ølkassunum. Maðurin varð tí tikin og skuldsettur fyri "ulovlig omgang med hittegods", sum tað eitur á donskum rættarmáli.